# TB vann á Giljanesi

*Flogbóltur:* *Við sigrinum á Drátti á Giljanesi sunnudagin hevur TB givið sær sjálvum eitt sera gott útgangsstøði í kappingini um silvurmerkini*



Dráttur-TB 1-2
(21-19, 20-22, 7-3
21-16, 16-21, 5-7
5-15)

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað eydnaðist heldur ikki Drátti at vinna á TB hesaferð. Sjálvt um dysturin var á heimavølli í høllini á Giljanesi var eydnan ikki við Drátti, sum tapti ein rættiliga javnan dyst tá samanum kom.

Sum tað sæst á settúrslitunum, var onganti ðgreið yvirvág til nakað av liðunum tí tey skiftur um at vinna settini.

Tí varð hesin dystur toygdur út í javnbrótara í báðum hálvleikum, og tí mátti eisini javnbrótari til fyri at avgera hann. Og tað var í grundini einasta ferðin, greiður munur var á liðunum.

TB vann seinasta javnbrótaran sannførandi 15-5.

**Tryggar á øðrum plássi**

Dysturin millum Drátt og TB var dystur um annað pláss, og við sigrinum sunnudagin er neyvan sannlíkt, at nakar fer at taka silvurmerkini frá TB.

Tær hava seks stig, eins og Dráttur, men hava leikt tveir dystir færri enn vágakvinnurnar. Tískil kann munurin koma upp í fýra stig, og tað verður alt ov tungt at taka nú so lítið er eftir av kappingini.

Hjá tvørágentum má hetta takast sum eitt ordans herðaklapp. Tær mistu meiri enn eitt heilt lið áðrenn kappingin byrjaði, men kortini hava tær hildið seg í toppinum av deildini, og tað má sigast vera framúr væl klárað.

# Dramatikkur í Gundadalshøllini

*Flogbóltur:* *Fyri tað um talan er um botndyst, gerst hann ofta minst líka spennandi sum toppdystirnir. Soleiðis var eisini tá Fleyr og ÍF hittust í kvinnudeildini sunnudagin*



Fleyr-ÍF 2-1
(21-14, 14-21, 7-5
15-21, 15-21, 16-14)

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað var einki minni enn ein botnuppgerð burturav tá Fleyr og ÍF hittust í meistaradeildini hjá kvinnum sunnudagin. ÍF hevur liðið niðast alt árið, meðan Fleyr er gliðið niðureftir stiganum spakuliga men trygt.

Fyri tað, kunnu áskoðararnir kortini fáa spennandi dystir burturúr hesum, og tað var eisini júst tað sum hendi í Gundadalshøllini sunnudagin.

Dysturin varð toygdur út til tann seinasta javnbrótaran tí liðini høvdu vunnið hvør sín hálvleik, og sjálvur endin av dystinum gjørdist ein reinur gysari.

**Vunnu mest men taptu**

Við nýggju flogbóltsreglunum verður ikki spælt »best av fimm«, men í tveimum hálvleikum. Hetta kann hava við sær, at lið, sum bert vinnur eitt sett í dystinum, við at vinna javnbrótararnar kann vinna dystin.

Hetta var júst tað, sum hendi í Havn sunnudagin.

Fleyr vann fyrsta sett, og tapti síðani øll hini settini. Kortini vunnu tær dystin tí tær vunnu lítla javnbrótaran í fyrra hálvleiki og tann seinasta um dystin.

Løgið? Jú víst, men fyri tey sum vinna dystin er tað stuttligt.

Ivast kortini onga løtu í, at ÍF genturnar eru í øðini um, at tær sleptu øllum á gólvið nú tær høvdu møguleikan at leggja Fleyr afturum seg.

Men sum so ofta er sagt í fótbólti, at tað eru teir smáu marginalarnir, sum avgera dystin. Soleiðis er tað eisini í flogbólti.

Við sigrinum sunnudagin kann Fleyr hótta triðjaplássi hjá Drátti, sum bert er tað eina stigið frammanfyri. Samstundis hava vágagenturnar spælt ein dyst fleiri enn Fleyr, og tí kann tann kappingin enn gerast spennandi.

# Einki at gera hjá Fram

*Flogbóltur:* *Eingin stórdystur spurdist burturúr tá Fleyr og Fram hittust sunnudagin. Fleyr gjørdi bart og styrkti harvið um oddastøðuna í meistaradeildini hjá monnum*



Fleyr-Fram 2-0
(21-18, 21-14
21-8, 21-19)

SVEINUR TRÓNDARSON

Toppdystur var í Gundadalshøllini sunnudagin, tá mansliðini hjá Fleyr og Fram hittust, men hóast tað undan dystinum kundi bent á at dysturin fór at gerast spennandi, varð hetta av ongum. Fleyr vann ein greiðan 2-0 sigur, og hevur nú allar hugsandi møguleikar at gerast meistari.

Størra havnafelagið er nú átta stig frammanfyri Mjølnir og Fram, sum kortini hava spælt ein dyst færri. Tað merkir í stuttum, at nú bert fimm dystir eru eftir, eru bert teoretiskir møguleikar fyri, at annað felag skumpar Fleyr av rókini.

**Funnið stevið aftur**

Seinastu tvey vikuskiftini undan hesum hevur annars ikki gingið so væl í hond hjá Fleyr.

Teir hava spælt dystir móti veikaru liðunum og hava í báðum førum tapt fyrra hálvleik. Tí var ikki óhugsandi, at Fram kundi taka stigini frá Fleyr.

Soleiðis varð kortini ikki, og orsøkin til tað er uttan iva, at Fleyrleikararnir hava nógv lættari við at seta seg upp til ein dyst tá mótstøðuliðið er sterkt enn tá tað er veikt. Ikki tí, sørvingar og fuglfirðingar hava hvør í sínum lagið tikið stig frá sterkum liðum.

Hartil skal eisini sigast, at tað »í havnahøpi« hevur stóran týdning at vinna innanhýsis dystirnar í Havnini.

**Uppiborið**

Tá vit skulu taka saman um mugu vit staðfesta, at tað er fult uppiborið at Fleyr er oddalið í landskappingini.

Teir hava víst klárt tað besta spælið í ár, men so skylda vit eisini at siga, at Fleyr eisini er tað liðið av øllum, sum hevur mist minst í ár sammett við í fjør.

Hetta hevur sjálvsagt stóran týdning fyri heildina, og tað merkist eisini serstakliga væl á spælinum hjá Fleyr, sum, tá tað gongur upp tað besta, gongur einastandandi væl.

Og tá so er, kann vera meiri enn trupult hjá mótstøðuliðunum at verja fyri. Sjálvandi fær eitt oddalið eisini niðurtúrar og í so máta er Fleyr einki undantak. Men fyrimunurin er kanska tann, at teir hava duga at fóta sær tá á hevur staðið. Tí liggja teir har teir liggja, og tí hava teir ikki tapt enn í ár.



SOSIALURIN er har tað hendir

-ver við frá byrjan!

2000

HALD SOSIALIN WWW.SOSIALURIN.FO

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

sosialu

**Fundarrøð í ELIM í Søldarfirði**

**Fundirnir verða:**

| | | |
|---|---|---|
| Mikukvøldið | kl. 8.00 | |
| Hóskvøldið | kl. 8.00 | |
| Fríggjakvøldið | kl. 8.00 | |
| Leygarkvøldið | kl. 9.00 | Hjúnamøti |
| Sunnukvøldið | kl. 6.00 | |

**Talarar verða:**
**Poul Færø og Arni Simonsen**

Sangluttøka verður m.a. úr **Ebenezer** í Havn og **Betesda** í Klaksvík.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman í ELIM**

**Roknskaparleiðari**

Søkt verður eftir roknskaparleiðara til Leirvíkar Kommunu at byrja beinanvegin ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðið fevnir um bókføring og fíggjarstýring, umframt vanligt skrivstovuarbeiði.

**Førleiki:**
Útbúgving innan roknskap og/ella hollar royndir frá roknskaparabeiði er ein treyt, eins og kunnleiki til nýtslu av teldu.

**Løn:**
Løn verður goldin sb. sáttmála við avvarandi felag.

**Upplýsingar og umsókn:**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Sjúrð Eliasen, tlf. 443123. Umsókn við avritum av møguligum prógvum skal sendast til Spf Grannskoðarastovuna, 480 Skála, innan 15.2.2000.

Spf Grannskoðarastovan
480 Skála
Tlf. 441666

Vit hava tær vælumtóktu íslands-snellurnar DNG og íslands-rullurnar umframt LINE TEK stýringar



JÓANNES DAHL
460 Norðskáli
Tel. 22 10 00 / 42 22 74
Fax 42 21 89

Sosialurin - 311820

**Trygdarútgerð til øll endamál!**

- Verndarhjálmar og húgvur
- Hoyrivernd v/FM radio
- Brillur
- Maskur
- Trygdarskógvar
- Fallsikringar
- Handskar
- Hondreins
- Vit útvega skiltir til **øll** endamál!

Vit taka okkum av øllum uppgávum innan arbeiðaravernd

Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. $17^{00}$ til $23^{00}$

212380

**BILLUTIR**



ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

**DEKK/ AVBALANSERINGS-MASKINA**

Brúkt HOFMANN GEODYNA 30
VOH 380-415
Árg. 1986.
Eftirhugd 8/9-99 av DTI og góðkent.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn
Tel. 313666 - Fax 310866

**Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!**

- Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. **–nógv model!'**
- Eykalutir til viðfestisvognar
- Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord
- Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir **–óteljandi møguleikar!**
- Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.
- Tip - Ruskkonteinarir til trukkar
- Spennireimar og lyftistroppar
- Sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT**



SAFARI TRANSPORT
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 31 22 22

Lesið sosialin -tað loysir seg